# Nú skal hvør steinur vendast í Vági



*Høgni Hoydal vil nú hava ein kanningarstjóra at kanna leiklutin hjá landsstýrinum í sambandi við ætlanina at byggja ellis- og røktarheim í Vági og at flyta miðnámsskúlan til Hovs. Sjálvur heldur hann, at landsstýrið hevur brotið fleiri lógir og reglugerði, eins og tað hevur sett siðvenjur og mannagongdir til viks*

**Høgni Hoydal hevur nú klagað landsstýrið í sambandi við ætlanina at flyta miðnámsskúlan úr Vági og at byggja ellis og røktarheim har ístaðin. Hann vil nu hava ein kanningarstjóra at kanna málið**

ELLIS- OG RØKTARHEIM Í VÁGI

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú skal full greiða fáast á, um landsstýrið hevur borið seg rætt at í sambandið við málið um illa umstrídda ellis- og røktarheimið í Vági.

Tað er landsstýrismálanevndin hjá løgtinginum, sum nú skal greiða málið til botns.

Tað er Høgni Hoydal, sum hevur biðið nevndina kanna málið.

Formaður tjóðveldisfloksins sigur at hann hevur heitt á landsstýrismálanevndina um at biðja ein kanningarstjóra kannað málið til botns.

Hann sigur, at í hesum málið er so nógv farið fram í tí dulda og aftanfyri leiktjøldini og alt er ikki niðurskrivað og tí vænar hann, at einasti máti at fáa málið lýst til botns, er at fáa ein kanningarstjóra, sum fær heimild at taka fólk til avhoyringar og fáa frágreiðingar frá fólki, sum hava verið upi í málinum.

Kári P. Højgaard, formaður í landsstýrismálanevndini, vil ikki siga í smálutum, akkurát hvat tað er, sum løgtingsmaðurin hjá tjóðveldisflokkinum hevur kært um í hesum sambandi.

Men hann sigur, at tað, sum hann biðjur nevndina kannað, er, um landsstýrið hevur handfarið málið rætt, sum heild og sostatt skal alt málið endavendast.

Landsstýrismálanevndin hevur tikið málið upp og fyribils er tað sent til ummælis hjá løgmanni.

Samstundis er løgmaður biðin um at útvega nevndini øll skjøl í málinum og allar viðkomandi upplýsingar annars.

Og tað skal løgmaður gera áðrenn 1. mars.

Landsstýrismálanevnevndin hevur biðið løgmann standa fyri at savna skjøl og upplýsingar inn, tí her er talan er eitt mál, sum rakar málsøkini hjá fleiri landsstýrismonnum og tí hevur nevndin biðið løgmannsam skipa innsavningina av tilfarinum.

Fyrst og fremst er hetta eitt mál, sum kemur undir Almanna- og heilsumálaøkið hjá Hans Paula Strøm, tí talan er um eitt elis- og røktarheim. Men tað kemur eisini undir mentamálaráðið hjá Jógvani á Lakjuni, tí ætlanin at flyta miðnámsskúlan í Vági til Hovs, er eisini ein partur málinum.

Og at enda er talan kanska eisini um eitt mál, sum er úti á Argjum í figgjarmálaráðnum hjá Bárði Nielsen, tí tað er hann, sum hevur snikkað saman og góðkent eitt serligt fíggingartilboð til suðuroyingar ísamabandi við ætlanina hjá landsstýrinum at byggja skúladepil í Hovi og ellis-og røktarheim í Vági.

Upprunaliga orsøkin til kæruna er, at í heyst legði landsstýrið eina pakkaloysn fyri suðuroyingar, sum segði, at ætlaði miðnámsskúlin skuldi flytast til Hovs og leggjast í ein skúladepil har, sum eisini skuldi rúma ætlaða heilsuskúlanum á Tvøroyri.

Hinvegin skuldi eitt ellis- og røktarheim byggjast á stykkinum í Vági, sum varð grivið út til miðnámsskúlan.

Afturfyri skuldi landsstýrið geva kommununum eitt tilboð um serliga lagaliga fígging til ellis- og røktarheimið, tí kommunurnar í Suðuroy eru so illa fyri fíggjarliga og landsstýrið ætlaði eisini hetta sum eitt arbeiðsskapandi tiltak.

Men tað gekk ikki eftir vild hjá landsstýrinum. Í fyrru atløgu hevur tjóðveldisflokkurin barst sum úlvur á skóg fyri at forða fyri ætlanini, tí hann vildi varðveita skúlan í Vági.

Í øðrum lagi vildi Tvøroyrar Býráð ikki spæla við og hon er tí ikki við í ætlanini um at byggja ellis- og røktarheim í Vági. Og av tí, at Tvøroyri ikki vildi vera við, tóku hvalbingar somu støðu og fámjiningar hava ongantíð sagt, hvat teir ætlað.

Sostatt eru tað fyribils bara tær fýra kommunurnar í Suðuroyar syðru helvt, Sumbiar, Vágs, Porkeris og Hovs kommuna, sum standa saman um røktarheimið í Vági.

### Á markinum til maktmisbrúk

Høgni Hoydal sigur, at eftir hansara tykki er alt hetta málið eitt dømi maktsmisbrúk, har lógir og reglugerðir eru settar til viks. Hann hugsar bæði um at talan er um trot á fyrisitingarlógina.

Men hetta skal ikki skiljast so, at hann er ímóti, at edraøkið í suðuroy verður bygt út.

– Tað eru vit als ikki. Vit taka undir við at eldraøkið verður bygt út í Suðuroy og tá helst í Vági.

Men vit kunnu ikki góðtaka framferðina hjá landsstýrinum í hesum máli.

– Tað eru kommunurnar í einum øki, sum skulu taka stig til at byggja eldraøkið út. Og tað eru kommunurnar sjálvar, sum skulu gera av, hvussu eldraøkið verður best skipað í økinum.

Men í hesum føri er tað landsstýrið, sum hevur trumfað eina ávísa loysn á einum ávísum plássi ígjøgnum av berum politiskum orsøkum.

Í hesum sambandi hevur landsstýrið skúgvað kommunala sjálvræðið og fyrisitingarlógina til viks og tað er á markinum til maktmisbrúk, tá ið landsstýrið lovar suðuroyingum eina serliga lagaliga fígging og lán til endamálið.

– Hetta er ein heimild, sum landsstýrið ikki hevur og umboð fyri landsstýrið hevur eisini viðgingið í løgtinginum, at heimildin er ikki til staðar, men at landsstýrið má fyrst útvega sær heimldina frá løgtinginum.

– Sostatt hevur landsstýrið kroyst eina ætlan niðuryvir suðuroyingar, uttan at hava heimld til tað og suðuroyingar hava tikið støðu til eitt tilboð frá landsstýrinum, sum ongin heimild er fyri at geva.

– Tí havi eg varhugan av, at talan er bæði um brot á styrisskipanina, fyrisitingarlógina og kommunulógina. Og somuleiðis meti, eg talan er um brot á lógina um alment innlit, tí bæði fyrisitingarlógin og lógin um alment innlit krevja at alt av týdningi fyri eitt má, skal skrivast niður, men tað havi eg ikki varhugan av, er fylgt í hesum máli, sigur formaður tjóðveldisfloksins.

– Og tað er alt hetta, sum eg nú vil hva ein kanningarstjóra at kanna, sigur Høgni Hoydal.

# Í næstu viku verður klárt at ganga í land av Smyrli

**Eftir ætlan verða nýggja farstøðin í Suðuroy og landgongdin í Havn, verða liðug í næstu viku**

SUÐUROYARSIGLING

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú fáa ferðafólk við Smyrli munandi betri umstøður.

Gongst sum ætlað, verður nýggja farstøðin á samferðskuhavnini á Krambatanga, liðug í næstu viku og tá verður hon tikin í nýtslu.

Tað er annars nakað síðani, at Farstøðin varð handað eigaranum, men enn eru kortini nakrir snøklar eftir at gera.

Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki, sum er byggiharri, sigur, at hann væntar at alt arbeiðið verður liðugt í næstu viku og tá verður hon tikin í nýtslu.

Samstundis verður nýggja landgongdin í Havn liðug og sostatt fer tá at bera til hjá ferðafólki, sum eru til gongu, at koma umborð á Smyril og fara í land, í erva, uttan at noyðast allan vegin niður á biladekki.

Tað hevur annars ljóðað, at farstøðin í Suðuroy var liðug fyri langari tíð síðani, men at hon skuldi ikki takast í nýtslu, fyrrenn landgongdin í Havn eisini var liðug.

Strandferðslan váttar eisini, at báðar skulu takast í nýtslu ísenn, tí hildið verður ikki, at tað er rímiligt, at fólk skulu annan vegin í erva og hin vegin eftir biladekkinum.

Men tað er ikki av hesari orsøk, at Farstøðin í Suðuroy ikki er tikin í nýtslu enn.

Orsøkin er, at tað eru onkrir snøklar, sum ikki eru gjørdir, men gongst, sum ætlað, verður tað nú, sigur Oyvindur Brimnes

Í farstøðini í Suðuroy er tað, sum hoyrir til eina nýmótans farstøð, eisini lyfta og kunningardiskur og hon hevur kosta fimm milliónir at bygt.



*Nú er nýggja farstøðin í Suðuroy næstan liðug og í næstu viku verður hon helst tikin í nýtslu. Tá verður nýgja landggongdin í Havn eisini tikin í nýtslu og tá kunnu ferðafólk til gongu sleppa umborð og av Smyrli í erva, uttan at noyðast heilt niður á biladekki*